tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Niclas Johannesen
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Samráðingar við danir nærkast

Oddagrein

SAMRÁÐINGARNAR við danir um eina nýggja avtalu millum Føroyar og Danmark gjørdist sum øllum kunnugt jólatrøll. Ætlanin var at fara undir hesar samráðingar í farna ári og helst hava eina ella aðra loysn í málinum fyri nýggjár.

ORÐATAKIÐ sigur, at „leingi er tað, ið væl skal verða“, og hetta megu vit helst eisini fara at sanna í hesum málinum. Vit hava fyrr á hesum stað víst á, at tað er skeivt fyri ikki at siga ábyrgdarleyst at skunda ella trumla hetta stóra álvarsmál ígjøgnum og hava eisini har víst til orðatakið, at „hastverk er lastverk“.

NÚ eru tað sjálvandi tey, sum halda, at nú er bíðað nokk eftir eini loysn í hesum máli. Tað vera tað tó fleiri meiningar um. Broytingar í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar er so mikið stórt og álvarsligt mál, at tað skal hava sína tíð. Og sum í øllum øðrum lívsins viðurskiftum er neyv og góð fyrireiking ein meginfortreyt fyri at røkka einum góðum úrsliti. Hetta málið er einki undantak sum so.

FLEIRI fyrireikingar eru gjørdar, eitt nú hava vit fingið Hvítubók, vit hava fingið Caragata-frágreiðingina, vit hava havt orðaskifti á tingi og í fjølmiðlunum um hetta málið osfr. Hóast her fyriliggja nógvir áhugaverdir upplýsingar, so hevur tað neyvan sannført ein meiriluta av Føroya fólki um, at tað er rætt her og nú at staðfesta fullveldið Føroyar. Hetta er ein prosess, sum krevur at búnast til tess at kunna sodna. Tú hevur heldur ikki eitt einfalt svar uppá hetta málið. Tað er nógv størri enn so.

LØGMAÐUR hevur í hvussu er gjøgnumhugsað støðuna síðani hann á sinni gjørdi avtalu við Tjóðveldisflokkin. Hann er ikki so avgjørdur longur, tó at hann framvegis er sannførdur um málið. Men hann vil hava eina breiða semju, og hana fær hann ikki, er Javnaðarflokkurin ikki er við. Og her hevur formaðurin í Javnaðarflokkinum gjørt púra greitt, at flokkurin er bert við í eini komandi avtalu við Danmark, um hon verður innan fyri ríkisfelagsskapin. Og í hesum fær flokkurin stuðul frá stórum parti av fólkinum.

SEINASTU úttalilsini hjá formanni Javnaðarfloksins vísa, at flokkurin stendur fast við hesa støðu, og spurningurin er so, hvat samgonguflokkarnir vilja spæla út við fyri at taka hædd fyri hesi støðu Javnaðarfloksins!!! Hetta hevur løgmaður enn ikki grett orð um, og tí verður áhugavert at síggja og hoyra, hvussu leikur fer fram komandi vikurnar. Flestu føroyingar vilja broytingar í viðurskiftunum við Danmark. Vilja størri sjálvbjargni. Spurningurin er bara, hvussu og nær hetta verður gjørt. Løgmaður hevur eina stóra og torføra uppgávu at sjóva saman tey ymsu sjónarmiðini. Vónandi er hann eins góður diplomatur í verki eins og hann tykist vera tað í orð og tal. Sjálvstýrismálið ella fullveldismálið liggur nú í hondum løgmans.

Sosialurin

Viðmerking:

Nú mugu tit also taka tykkum saman á Sosialinum

Eg hvakk ikki sørt við týskvøldið, tá Útvarpið ringdi til mín og vildi hava at vita, hvat lá í yvirskriftini á forsíðuni og inni í blaðnum fyri í gjár. „Javnaðaðarflokkurin við í fullveldismálinum“ ljóðaði yvirskriftin, og henda hevði sjálvandi vakt forvitnið hjá útvarpsmanninum.

Eg hevði eina samrøðu við blaðmannin, og eg fekk greinina til gjøgnumlestur, áðrenn hon varð prentað. Og hon var í lagi. Millum okkum báðar var eingin miskiljing.

M. a. førdi eg fram um hesar báðar fundirnar, sum hava verið millum landsstýrið og Javnaðarflokkin:

• Møguleikin fyri at vit kunnu vera við í einum uppleggið til samráðingar er ikki útlokaður. (So leingi seinasti fundur ikki hevur verið, so er ikki siðvenja at skera bondini av)

• Partarnir skilja betur støðuna hjá hvørjum øðrum. (Skilja retorikkin hjá hvørjum øðrum)

• Landsstýrið veit, hvar vit standa, og vit vita, hvar teir standa. (Vøllurin er kritaður upp)

• Vit hava ikki útvekslað nakað skrivligt tilfar millum partarnar.

• Verður talan um eina skipan í einum felagsskapi (við Danmark), so eru møguleikarnar til staðar.

• Verður talan um eina skipan uttan fyri ein felagsskap (við Danmark), so eru vit ikki við longur.

• Fundirnir hava verið góðir

• Vit hava als onga tilsøgn givið um nakað sum helst

• Vit bíða eftir fundarboðum

Hvussu Sosialurin út frá slíkari samrøðu kann fáa seg til at gera slíka yvirskrift á bæði samrøðuni og á forsíðuni, tað skulu Gudarnir vita, men tað er als einki samband millum yvirskrift og innihald.

Slíkur journalistikkur er júst ikki álitisskapandi.

Jóannes Eidesgaard

Tað almenna sett í gildi uppsagnarpolitikkin

Løgmansskrivstovan hevur nú orðað almenna uppsagnarpolitikkin, sum er partur av starvsfólkapolitikkinum hjá tí almenna

EIRIKUR LINDENSKOV

Nú er uppsagnarpolitikkurin hjá tí almenna settur í gildi. Uppsagnarpolitikkurin er partur av almenna starvsfólkapolitikkinum, og er hann sendur stovnum og yrkisfeløgum.

Arbeitt verður framhaldandi við at orða ymisku partarnar av starvsfólkapolitikkinum. Uppsagnarpolitikkurin er fjórði partur, sum settur verður í verk, sigur løgmansskrivstovan í tíðindaskrivi.

Hinir partarnir eru: Setanarpolitikkur, starvsfólkasamrøður og útbúgvingarpolitikkur.

Í næstum verða partarnir um Arbeiðsumhvørvispolitikk og um Starvsfólkalutøku í sambandi við avgerandi broytingar á arbeiðsplássum, settur í verk.

Bólkurin, sum arbeiðir við at orða einstøku partarnar av starvsfólkapolitikkinum, arbeiðir í løtuni við at orða uppskot til m. a. eldrapolitikk og rúsevnispolitikk.

Givin út í pørtum

– Starvsfólkapolitikkur landsstýrsins setur karmar fyri tí høvuðspolitikki, sum er galdandi í almennu fyrisitingini, sigur Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri.

– Starvsfólkaviðurskifti, sum eru ásett í lóg, sáttmála og reglugerð, eru ikki endurgivin í starvsfólkapolitikkinum, og ansast má tí eftir, at slíkar ásetingar eisini verða fylgdar, tá talan er um at fremja starvsfólkapolitikkin í verki, sigur hon.

Starvsfólkapolitikkurin verður givin út í pørtum og er hetta fyri at fyrisitingin skal fáa tíð til at seta partarnar í verk, so hvørt sum teir koma út.

– Á henda hátt fær einstaki stovnurin eisini høvi til at elva til kjak og fáa íblástur til at menna starvsfólkapolitikkin á staðnum, heldur løgmansstjórin

Starvsfólkapolitikkurin fer tí eisini at innihalda vegleiðingar og dømi um, hvussu nærri kann verða fyriskipað í sambandi við ávís viðurskifti. Ætlanin er at starvsfólkapolitikkurin sum amboð skal elva til, at nádd verða tey høvuðsmál, sum landsstýrið hevur boðað frá og tey mál, sum einstaki stovnurin setur sær, sigur Marjun Hanusardóttir.

Løgmaður hevur yvirskipaðu leiðsluna

– Almenni starvsfólkapolitikkurin skal tryggja tann týdning, sum mál, mið og menning hava fyri at skapa trivna, dygd og samstarv, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, ið sum Føroya Løgmaður er ovasti starvsfólkaleiðari í almennu fyrisitingini - og sum varðar av yvirskipaða starvsfólkapolitikki landsins.

Hann sigur, at almenni starvsfólkapolitikkurin fer at seta út í kortið leiðreglur fyri, hvussu farast skal fram í starvsfólkapolitiskum viðurskiftum innan almennu fyrisitingina.

– Dagliga ábyrgdin av starvsfólkunum og soleiðis eisini ábyrgdin fyri einum virknum starvsfólkapolitikki liggur hjá tí einstaka stjóranum, og tað verður tí hann, sum hevur ábyrgdina av, at felags starvsfólkapolitikkurin verður lagaður til serligu viðurskiftini á staðnum, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður vísir eisini á, at sum fyrisiting løgmans orðar Løgmannsskrivstovan starvsfólkapolitikkin í tøttum samstarvi við aðalstýrini og stovnar tess. Løgmansskrivstovan hevur umsjón við, at starvsfólkapolitikkurin verður settur í verk og fer eisini at vera til reiðar at geva ráð og vegleiðing um starvsfólkapolitisk viðurskifti.

– Tað er mín vón, at starvsfólkapolitikkurin verður væl móttikin og sum frá líður gerst ein natúrligur og støðugur liður í landsins fyrisiting, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Fundur fyri fólk ið stama

– og stovnandi fundur av felag

EIRIKUR LINDENSKOV

Komandi leygardag klokkan 14 heldur Kristen Thyme, sum er talilærari við nógvum royndum í Danmark, fyrilestur fyri stamarum, avvarðandi teirra og øðrum áhugaðum um hennara máta at arbeiða við stamitrupulleikum uppá.

Kirsten Thyme ferðast nógv kring um í heiminum og greiðir frá hesum mátanum, »accentmátin«, ið hon hevur verið við til at ment.

Fundurin verður í MBF-húsinum.

Aftan á fundin, klokkan 15, verður stovnandi aðalfundur av felagnum fyri fólk, ið stama og avvarðandi teirra. Fyrireikararnir vóna, at fólk møta fjølment.

Gamla posthúsið í Havn verður nú umbygt at húsa miðfyrisiting býráðsins

Mynd: Jens Kristian Vang

Vilja veita borgarum betri tænastu

Gamla posthúsið í Havn verður nú innrættað til býráðshøll við postavgreiðslu og snarskivu. Teknisku deildirnar hjá býráðnum skulu eisini hýsast har

EIRIKUR LINDENSKOV

Mikil umbygging fer fram á gamla posthúsinum í Havn. Tað er Tórshavnar býráð, sum nú eigur posthúsið, eftir at Postverkið flutti høvuðsposthúsið í gamla bygningin hjá Idé Møblum við Hoyvíksvegin.

Tað eru Byggideildin, Tekniska Deild, Gartnaradeildin og Umhvørvisdeildin hjá býráðnum, sum skulu húsast á posthúsinum, men sum nakað nýtt er býráðið í ferð við at innrætta eina snarskivu, har borgarar skulu kunnu fáa skjótar og greiðar upplýsingar um mál, sum býráðið í eini handavend kann svara teimum. Slík mál kunnu t. d. vera sosialmál, smærri byggimál og teknisk mál.

– Endamálið er, at vit skulu kunna veita borgarunum eina tíðarhóskandi og betri tænastu, sigur Leivur Hansen, borgarstjóri.

– Vit hava valt at kalla tað eina snarskivu, men um tað verður endaliga heitið er ikki greitt enn, sigur borgarstjórin.

Leivur Hansen heldur, at eini 80% av vanligu fyrisitingunum kunnu svarast við eina slíka snarskivu, sum samstundis ger, at betri stundir verða til at taka sær av øðrum málum í fyrisitingin, sum taka meiri tíð.

Leivur Hansen, borgarstjóri í Havn

Ætlanin hjá býráðnum í Havn er eisini at gera eitt innanduratorg, har avgreiðslan hjá Posthúsinum fyrr var. Høgrumegin verður framvegis ein postavgreiðsla, meðan avgreiðslan hjá býráðnum verður hinumegin. Postboksir verða framvegis í gamla posthúsinum í miðbýnum.

Ætlanin er eisini, at høvi skal vera at hava listaframsýningar í nýggju býráðshøllini.

Tórshavnar býráð hevur í dag stóran tørv á plássi, sigur Leivur Hansen.

Í miðfyrisitingini hjá býráðnum starvast nú eini 50-60 fólk, og er tað meira, enn tað var áðrenn hópuppsagnirnar í kreppuárunum 1991/92, tá stórur partur av starvsfólkunum hjá býráðnum vórðu søgd úr starvi og deildir lagdar niður.

Tað eru nøkur ár síðani, at Tórshavnar býráð keypti bygningin frá Postverkinum, sum kortini ikki heilt er flutt úr bygninginum. Avtala er gjørd millum býráðið um, at Postverkið leigar 140 fermetrar av 1.400 fermetra stóra bygninginum í fyribils tíggju ár,

Gamla posthúsið í Havn varð bygt fyrst í øldini. Nýggjari bygningurin, sum stendur út móti Tórsgøtu er bygdur miðskeiðis í øldini eins og millumbygningurin, har postavgreiðslan hevur verið seinastu nógvu árini. Niðan fyri gamla Posthúsið var ein vakur urtagarður, og standa enn onkur av vøkru trøunum við Tórsgøtu.

Millum bygningin hjá Mariu Poulsen og Posthúsið var í sínari tíð ein gøta, sum býráðið nú ætlar at endurskapa, so møguligt verður hjá fólki at ganga tann vegin eftir vakrari gongugøtu.

Eitt gott arbeiðspláss

Skúlatannlæknastovan í Klaksvík gott arbeiðspláss

Bogi á Steig og Malan Thomsen hava havt 25 ára starvsdag á Tannlæknastovuni í Klaksvík, meðan Lena Gerðalið hevur verið har í 33 ár

Mynd: Dávur Winther

Fríggjadagin hátíðarhelt Bogi á Steig 25 ára starvsdag sín sum skúlabarnatannlækni í Klaksvík.

Tað er kortini ikki bara hann, sum hevur verið so leingi á stovninum: Malan Thomsen hevði eisini 25 ára starvsdag sum tannklinikkassistentur — og »the Grand old Lady«, Lena Gerðalíð, kundi eisini hátíðarhalda sín 33 ára starvsdag sum tannklinikkassistentur.

Aðrar damur, sum eru á skúlatannlæknastovuni í Klaksvík, hava verið á stovninum í 14 og 12 ár. So talan má vera um eitt gott arbeiðspláss, siga tey úr Klaksvík.

Býráðssalurin umvældur

EIRIKUR LINDENSKOV

Býráðssalurin í Havn hevur seinastu tíðina fingið eina »andlitsviðgerð«, sum borgarstjórin í Havn, Leivur Hansen málber seg.

Húsið, ið fyrr var meinigheitshús, varð heldur slitið, og hava teir tí m. a. skift út gólvini. Samstundis er dururin broyttur, og glasveggir uppsettir, so betur sæst út í gongina.

Fýrrúmið er tikið burtur og flutt úr húsinum, og førir hetta við sær, at betur pláss er í eysturendanum, sigur Leivur Hansen

Býráðið hevur júst gjørt av at innføra talutíð til býráðslimirnar, og í hesum sambandi verða klokkur settar upp, so talararnir síggja, hvussu nógv er eftir at talutíðini

Talan verður kortini ikki um slíka fína teldustýrda atkvøðuskipan, sum løgtingið fekk fyri nøkrum árum síðani, sigur Leivur Hansen.